# Jonhard Hammer fjøruti

Í morgin 7. mai verður Jonhard Hammer, stjóri á Rás2, fjøruti ár.

Jonhard er gøtumaður, hóast hann í faðirætt er ættaður sunnan av landi og í móðurætt úr Fuglafirði. Jonhard er uppvaksin í Syðrugøtu, hevur gingið í skúla við Gøtugjógv og býr nú í Norðragøtu – arbeiðir í Havn – so hann ein so globalur gøtumaður, sum hann kann vera.

Jonhard er sonur Harald Hammer, sum er ættaður av Tvøroyri, og Sonju, sum er ættað úr Fuglafirði.

Eftir lokna skúlagongd fór Jonhard í prentaralæru hjá Stig Rasmussen á Estra. Hann hevur arbeitt sum prentari í nøkur ár, og eisini gingið á Handilsskúla á



Kambsdali. Men Jonhard vildi meira og annað, enn at vera prentari.

Framíhjá hevur Jonhard fingist nógv við tónleik – fyrst og fremst við at skipa fyri konsertum og tónleikatiltøkum. Tað er ikki tann tónleikarin, hann ikki kennir, føroyskar sum útlendskar. Soleiðis var hann eisini frá byrjan partur av Summarfestivalinum í Klaksvík.

Ein dagin í 1997 kom Jonhard út í blaðhúsini hjá Sosialinum á Argjum. Hann hevði frætt, at Sosialinum tørvaði sølufólk, og hann beyð seg fram. Hann hevur dugað væl at tosa fyri seg, tí hann varð settur í starv – og hann hevur síðani starvast á Sosialinum, fyrst sum sølumaður, síðani sum marknaðarleiðari.

Tá ið Sosialurin í 2007 keypti útvarpsrásina, Rás2, varð Jonhard primus motor at fáa hesa verkætlan framda, og hann varð eisini settur sum stjóri.

Jonhard hevur sum stjóri á Rás2 verið ein profilur í føroyskum fjølmiðlum. Hann hevur eina stóra uppgávu, og hann leggur nógva orku í arbeiðið. Hann smæðist ikki at taka dystin upp við tey stóru, tað verið seg kringvarpsstjóran og hennara fylki, eins og alla ta politisku skipanina, sum heldur uppi eini - fyri privatu miðlarnar - sera órættvísari skipan.

Og fyri tíðindafólkini á redaktiónini er Jonhard ikki so galin, tí hann er tíðindafróur og hevur altíð eina góða søgu – og tað er søgunum, Miðlahúsið livir av.

Jonhard er giftur Oluffu f. Jacobsen av Glyvrum. Tey eiga børnini Sonju, sum er 10 ár og John sum er 7 ár.

---

# Ása Lützen 70 ár

Í morgin 7. mai verður Ása Lützen í Havn 70 ár. Ása er ættað úr Norðragøtu, dóttir Jacobinu og Heina Heinesen. Ása fekk eitt vanligt lív hjá eini bygdargentu, hon vaks upp í einum bóndaog fiskimannaheimi. Farin úr skúlanum 14 ára gomul fór hon at arbeiða í "pakkhúsinum", tí gamla bygdahandlinum í Norðragøtu, sum eins og aðrir bygdahandlar vóru eitt slag av bygdahúsi, har fólk komu saman at fáa sær eitt prát. Her arbeiddi mamman eisini í síni tíð.

Ása fór niður á háskúla, eins og tað var vanligt tá í tíðini hjá ungum fólki. Komin heim aftur fór hon at arbeiða hjá Valdemar Lützen. Har er hon enn, tí hon fann saman við soni Mogens Lützen, Kim, og tey giftust. Tey hava fingið fýra børn Mogens, Ingibjørg, Heina og seinast Maluna, sum Ása fekk á sínum 43 ára føðingardegi. Ommubørnini eru átta, sum hon er púra forstýrað av.

Sigast kann, at Ása er ein serlig kvinna á fleiri økjum. Har hon er, er hon 100%.



Hetta gevur fleiri 100% tilsamans!

Ása er meira enn onnur eitt familjumenniskja í orðsins rætta týdningi Hon er eitt slag av kvinnuligum patriarki fyri øll síni systkin og teirra. Hon er "gumman" hjá øllum í yngra ættarliðnum. Er nakað á vási, er Ása mitt í rokanum og tekur sær av teimum øllum sum ein rættilig hønumamma. Her er eitt hjarta á røttum stað.

Umframt er Ása sera virkin á øðrum økjum. Eitt av hesum er Aglow, sum er ein kristiligur felagsskapur fyri kvinnur. Her er Ása eisini við í føroysku leiðsluna. Hetta merkir møtir og fundir víða hvar, bæði í Føroyum og uttanlands.

Ikki er heldur at gloyma Ísrael. Tann ótreytaða kærleikan til jøðar og teirra land hevur Ása frá mammu síni, sum aftur fekk hann frá fastur síni Jóhonnu, sum var ættað av Skipanesi. Henda kærleika hevur Ása eisini latið víðari til síni børn.

Hesin alskur hevur ført Ásu á ótaldar ferðir til Ísrael, sum hon man kenna sum fáur, og sum hon stuðlar, tá ið hon kann. Á fleiri av hesum ferðum hevur Ása eisini umboðað Føroyar, og tað hevur verið við maner! Á henda hátt er Ása komin at kenna nógv líkasinnað fólk víða hvar, og tað er ikki so sjáldan, at hon fær vitjan av teimum.

Tískil kennir Ása eina ómetaliga rúgvu av fólki. Øll føla seg væl inni hjá teimum, sum er sum eitt heim fyri mong. Ikki minst fyri tann, sum skrivar hesar reglur. Tá ið eg kom til Havnar fyri 40 árum síðani, var eg einsamallur í fleiri ár. Men tá varð eg móttikin sum húsfólk heima hjá Ásu og Kim. Slíkt verður ikki gloymt! Annars hevur verið vinskapur millum ættirnar hjá okkum í Norðragøtu í fleiri ættarlið.

Sum skilst er Ása sera høgtflúgvandi og er sjáldan í frið. Men hon hevur tíbetur ein mann, sum er meira jarðbundin, og sum tryggjar, at jørðforbindilsið ikki verður púra slept!

Føðingardagin hevði Ása ætlað at vera langt av landi skotin, men umstøðurnar gjørdu hetta ómøguligt. Tískil verður dagurin hildin saman við børnunum.

Góða Ása. Vit eru mong, sum vilja ynskja tær tillukku við "støvets år", sum kortini ikki á nakran hátt merkist á tær.

**Óli í Tjørnustovu**

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaða kona, mamma, vermamma og omma

**Jónhild Lauridsen**
**fødd Heinesen**
**ættað av Gili í Kunoy**
**men búsitandi í Vinderup í Danmark**

andaðist í heiminum
týsdagin 26. apríl, 74 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vinderup Kirkju
fríggjadagin 6. mai kl. 14.

***Fyri tey avvarðandi***
**Poul, Thorbjørn, Janni, Toke og Bjarke**

Tey, ið ynskja at minnast Jónhild við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata eina peningagávu til Krabbameinsfelagið, konto í peningastovnunum.

---

## TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Olentine Selma Mortensen**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Jónsvein Bech, prest,
fyri vælvald orð í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Serstøk tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi fyri góða røkt.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu
til við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávu
til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim.
Og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

***Vegna familjuna***
**Bogi**